KRINGVARP FØROYA

tveir stovnar, sum eru lagdir saman.

–Myndamálið í búmerkinum er opinleiki, fleksibilitetur, interaktivitetur og karmurin um tað fjølbroytta innihaldið. Kjarnin í búmerkinum er í veruleikanum tað, sum ikki er har. Ella tað sum kann verða skapt innan fyri breiðu karmarnar hjá Kringvarpi Føroya, siga Allan Dalsgaard frá fyritøkuni ReproZ, sum hava staðið fyri verkætlanini.

## Reyði liturin

Margfeldi og fjølbroytni eru lyklaorð hjá Kringvarpinum, og í litavalinum hjá Kringvarpinum kemur hetta til sjóndar á sjónvarpsskíggjanum. Tó er neyðugt, at stovnurin hevur ein grundlit, sum verða nýttir til eitt nú búmerki og prentlutir, siga tey í ReproZ, og halda fram,

– Vit valdu ein djúpan myrkareyðan lit, sum er heitur, og sigur frá lívi og dynamikki. Tað hevði verið nærliggjandi at valt ein neutralan lit, fyri at undirstrika Public Service funksjónina hjá Kringvarpinum, men slíkur hugsunarháttur er ein farin tíð. Tó at Kringvarpið er ein Public Service stovnur, er hann í kapping við privatar miðlar og skal skilja seg út, sigur Allan Dalsgaard. Og hann greiðir frá, at tað er fyritøkan hjá teimum, sum í felag hevur arbeitt seg fram til úrslitið, men at tað er íslendingurin Birgir Már Sigurðsson, sum hevur teknað búmerkið. At umboða áhugamálini hjá kringvarpinum í tilgongdini, hevur arkitekturin Eyðun Eliasen samstarvað við ReproZ.

## Skriftin

Sambært ReproZ eitur skriftsniðið hjá Kringvarpi Føroya Rotis. Rotisfamiljan inniheldur fýra høvuðssnið, og Kringvarpið nýtir trý teirra. Rotis Semi Serif, Rotis Sans Serif og Rotis Serif.

Í búmerkinum er sniðið Rotis Semi Serif nýtt. Hetta sniðið hevur ein framtíðardám, og er kanska eitt eindømi í skriftsniði, tí seriffarnir, "føtirnir", á stavunum bert eru í erva á skriftini. Mest nýtta skriftsniðið er Rotis Sans Serif. Henda skrift er neutral, og liðilig. Egnar seg væl á prenti, á skeltum og ikki minst á sjónvarpsskíggjanum. Rotis Serif verður nýtt til breyðtekst, einamest á brøvum o.ø. prentaðum tilfari, greiða tey frá á ReproZ,

## Heimasíðan

Ætlanin er eisini, at felags heimasíðan hjá Kringvarpinum skal fara at virka um eina tíð. Kringvarpsstjórin sigur, at heimasíðan verður eitt gott tilboð til brúkarar stovnsins, við øllum tí sum heimasíðunar bjóða í dag, umframt tíðindaportal.





Hotel Føroya søkir eftir innkeypara at byrja skjótast tilber.

**Starvið**
Talan er um eitt starv, har umsøkjarin, í tøttum samstarvi við høvuðskokkar, matstovu- og móttøkuleiðarar, hirjuna og leiðsluna, hevur ábyrgdina av øllum vøruinnkeypi. Innkeyparin hevur ábyrgdina av:
- Vøruinnkeypi og vørumóttøku
- Goymslustýring
- Vørugóðsku og vøruúrvali
- Aðrar, fyri hotellið, viðkomandi uppgávur

**Umsøkjarin:**
Vit væntað at umsøkjarin hevur:
- Royndir innan matvøruyrki
- Vilja og evni til at royna nýggjar leiðir
- Er álítandi og sparin
- Góðan teldu - og málkunnleika
- Sera góð samstarvsevnir

**Vit bjóða:**
- Eitt sjálvstøðugt og spennandi starv
- Fakligar avbjóðingar
- Eitt dynamiskt arbeiðsumhvørvi
- Gott samanhald
- Kappingaførar setanartreytir

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til stjóran Johannes Jensen á 31 75 00.

Umsóknir skulu sendast til:

Hotel Føroyar P/F
Postsmoga 3303
110 Tórshavn

Umsóknir skulu verða okkum í hendi innan 10. mars 2006.

Hotel Føroyar ★★★★

*Hotel Føroyar er eitt altjóða hotel við 4 stjørnum. Hotellið er tað størsta í Føroyum við 216 seingjarplássum. Alt árið er Hotel Føroyar ein miðdepil fyri fundar- og skeiðvirksemi, eitt hotel fyri handilsfólk og ítróttarfólk. Um summarið virkar hotellið eisini sum frítíðarhotel. Í løtuni starvast 50 fólk á Hotel Føroyum.*



# Móttøka

Í samband við, at vit eru flutt í nýggj hølir í J. C. Svabosgøtu 48, Tórshavn, verður bjóðað til móttøku fríggjadagin 3. mars 2006 frá kl. 15.00 til 17.30

*Telefon og -fax eru broytt til:*
*Tlf. 309400 Fax. 309409*

***Roknskaparfelagið***

Roknskaparfelagið Spf
J. C. Svabosgøta 48
Postboks 2210
Fo-110 Tórshavn
Tlf. 309400 Fax. 309409
*www.roknskap.fo*
*roknskap@roknskap.fo*







# Starvsfólk

TIL BURGER KING Í SMS

## Fulla tíð

Søkt verður eftir fólki M/K sum er 18 ár ella eldri, til at arbeiða fulla tíð – at byrja skjótast tilber. Ert tú opin, virkin, røkin og dámar tær væl at arbeiða har tað veruliga hendir nakað, so er hetta tað. Her er nógv at gera. Tú mást vera før/ur fyri at hava nógvar „bóltar í luftini“ samstundis. Tað ger onki, um tú hevur hóskandi royndir. Vit seta teg inn í okkara arbeiðsmannagongdir, og eftir hetta kanst tú gerast eitt av álitisstarvsfólkum okkara.
Vit gleða okkum til at hoyra frá tær...

**Send umsóknina til:**
Burger King, SMS, Postboks 1059, 110 Tórshavn.
ella far inn á sms.fo og útfyll eitt umsóknarskjal

BURGER KING